# Góvu týðandi upplýsingar

*Fríggjadagin fullu tveir dómar í stóra rúsevnismálinum. Tveir menn, 23 og 27 ára gamlir, fingu tveir mánaða fongsulsrevsing. Teir greiddu frá, hvussu rúsevnissølan fór fram í Havn, og hesar frágreiðingar kunnu vera týðandi í heildarmyndini, sum ákæruvaldið roynir at greiða*

*Tilvildarliga savnsmynd*



**Fríggjadagin seinnapartin fingu tveir menn, sum eru 23 og 27 ára gamlir, tveir mánaða fongsulsrevsing fyri sølu av hassji. Menninir játtaðu seg sekar og greiddu rættinum frá, hvussu sølan av narkotika varð fyriskipað í Havn. Hesar upplýsingar kunnu gerast ein týðandi liður í heildarmyndini**

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Aftur fríggjadagin var rættarfundur í narkomálinum. Tveir menn vóru á ákærubeinkinum í Føroya Rætti.

Ein 23 ára gamal maður fekk tveir mánaða treytaða fongsulsrevsing. Tað vil siga, at maðurin ikki skal inn at sita í fyrsta umfari. Um hann tó verður tikin í sama lógarbroti komandi tvey árini, so kemur kemur dómurin í gildi, og hann skal inn at sita. Ein 27 ára gamal maður fekk hinvegin ein treytaleysan dóm á 60 dagar.

Menninir játtaðu seg sekar, og teir greiddu frá, hvussu ein útlendingur í Føroyum skipaði fyri narkosølu í Føroyum, og hvussu hann at kalla stýrdi marknaðinum. Hesar upplýsingar kunnu gerast ein týðandi liður í heildarmyndini, sum er gerst alt greiðari eftir hvønn dóm, sum fellur í stóra narkomálinum.

Teir dømdu keyptu hassj frá manninum fyri 100 krónur grammið og seldu víðari fyri 125 krónur. Vanliga keyptu teir 50 gramm í senn.

**Fekk ein møguleika**

Tann 23 ára gamli viðgekk, at hann hevði selt eitt kilo av hassji seinastu tvey árini. Hann segði hinvegin, at hann royndi at sleppa úr rúsevnisumhvørvinum í løtuni. Hetta tók dómarin til eftirtektar, og tí feldi hann ein treytaðan dóm. Orsøkin var, at maðurin skuldi fáa ein møguleika at koma úr kriminalitetinum og varðveita læruplássið, sum hann hevur fingið.

Ákæruvaldið hevur valt ikki at kæra henda dómin, hóast tað kravdi heldur harðari revsing, tí tað góðtekur, at maðurin fær ein møguleika at koma burturúr kriminaliteti.

Tann 27 ára gamli maðurin fekk tveir mánaða treytaleysa fongsulsrevsing, og hann skal inn at sita henda dómin. Hann varð ákærdur fyri at hava selt tvey kilo av hassji, men vildi bara viðganga at hava selt eitt kilo av hassji ígjøgnum nøkur ár. Dómarin tók frágreiðingina hjá tí ákærda til eftirtektar.

Hesin maðurin er fyrr dømdur fyri at hava smuglað smærri nøgdir av hassji til Føroyar, og tað hevði herðandi ávirkan. Tí fekk hann treytaleysan dóm. Ákæruvaldið kravdi í hesum førinum tríggjar mánaðir handan rimar.

Maðurin greiddi frá eins og tann fyrri, at hann nú royndi at koma burtur frá hesum umhvørvinum. Hann var fluttur út á bygd og hevði fingið eitt arbeiði fyri fyrstu ferð í lívinum.

Dómarin valdi at geva honum eina linari revsing enn ákæruvaldið kravdi, men av tí at hann fyrr er dømdur, skal hann inn at sita.

## Maður meldaður fyri konubuking

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið varð løgreglan í Havn boðsend at koma til eini sethús í Havn. Konan í húsinum hevði sjálv meldað mannin fyri harðskap.

Konan varð ógvuliga illa viðfarin, tí maðurin hevði bæði sparkað og sligið hana. Maðurin varð ikki handtikin, men løgreglan veit, hvør gerningsmaðurin er.

Konan hevur fingið skaða av álopinum, men hon fær neyvan varandi mein. Hon verður kannað av einum lækna, sum skal meta um skaðarnar, og síðani fær løgreglan eina frágreiðing um tilburðin.

## Tóku fleiri skutarar

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Klaksvík hevur hetta vikuskiftið tikið fleiri skutarar, sum koyrdu ólógliga skjótt. Talan er um fýra skutarar ella prult, ið eru tikin frá eigarunum.

Orsøkin er, at skutararnir eru tunaðir, so at teir koyra skjótari enn loyvt er. Ein skutari hevur loyvi at koyra 30 kilometrar um tíman, men hesir, sum vórðu tiknir um vikuskiftið, kunnu koyra 80-90 kilometrar um tíman.

Tann luturin á skutaranum, sum er ólógligur, verður tikin av, og eigarin fær hann aftur. Um sami skutarin verður tikin tríggjar ferðir, fær eigarin hann ikki aftur.

## Ferðsluóhapp á Tvøroyri

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið var eitt lítið ferðsluóhapp á Tvøroyri. Eingin stórvegis fólkaskaði hendi.

Óhappið hendir, tá ein ungur maður á prutli ætlar sær framum ein persónbil. Bilurin vendir júst tá til vinstru av vegnum. Maðurin á prutlinum rennir tí inn í síðuna á bilinum. Undir vanligum umstøðum er tað førarin í persónbilinum, ið fær ábyrgdina av einum slíkum óhappi.

Tann ungi maðurin á prutlinum varð fluttur á sjúkrahúsið til kanningar, men hann fekk einki stórvegis mein. Prutlið er illa farið, men bilurin fekk lítlan skaða.

# Føroya Tele nýggja boðtænastu

TELE
*Stefan í Skorini*

Føroya Tele hevur fingið nýggja Boðtænastu, sum hevur nummarið 480 000. Hon gevur brúkarunum fleiri møguleikar enn tann gamla, sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi.

Ein av nýggju møguleikunum er, at nýggja Boðtænastan sendir eini SMS boð til fartelefonina, tá nýggj boð eru í klivanum. Vegleiðing til nýggju tænastuna verður send út við komandi fartelefonrokningum.

Gamla boðtænastan, sum hevur nummarið 303 000, verður tó virkin til 1. mai 2002, so at boð kunnu avgreiðast í henni eina tíð enn.

Fyri at skifta frá gomlu til nýggju Boðtænastuna til nýggja nummarið 480 000 leggjast inn í víðaristillingina til Boðtænastuna ístaðin fyri gamla nummarið 303 000. Eisini skal nýggj uppseting til Boðtænastuna gerast fyrstu ferð ringt verður við til nýggja nummarið. Vegleiðing um hetta fæst í telefonini. Nærri kunning fæst eisini í vegleiðingini.

Vinnukundar, sum hava persónligt boðtænastunummar, kunnu nýta sama nummarið til nýggju Boðtænastuna. Um lurtast skal eftir boðum í gomlu Boðtænastuni, skal ringjast 303 000, tí persónliga boðtænastunummarið er virkið í nýggju tænastuni. Meira fæst annars at vita í Telebúðunum og við at venda sær til Føroya Tele.



